# Ingigerð á Trøðni 65 ár



*Ingigerð á Trøðni við diskin í Kunningarstovuni í Gamla Bókahandli í Havn*

Sunnudagin 18. januar fyllir Ingigerð á Trøðni í Havn 65 ár. Ingigerð er fødd á Frederiksberg, dóttir Karen, f. Olsen, úr Helsingør, og Heina á Trøðni úr Havn.

Eftir lokið studentsprógv tók hon læraraprógv á Københavns Dag- og Aften Seminarium í 1969. Hon var lærari í Hvidovre frá 1966-70. Frá 1970-85 var hon lærari á venjingarskúlanum í Havn, samstundis sum hon undirvísti á Føroya Handilsskúla frá 1975-85.

Í 1983/84 var hon á árskeiði á Fróðskaparsetri Føroya við serligum denti á siðsøgu og enskt. Saman við Marionnu Simonsen hevur hon greitt úr hondum lærubókina Maskinskriving I .

Síðan 1985 hevur Ingigerð verið stjóri á Kunningarstovuni í Havn. Eitt av hennara hjartamálum er gongubólkurin hjá Felagnum Tórshavn, sum hon saman við øðrum var við til at stovna í 1993. Tey skipa fyri gongutúrum í Føroyum og eisini uttanlands. Hon er eisini ferðaleiðari á gongutúrum, eitt nú í gomlu Havnini.

Ingigerð er gift við Kjartani Kristiansen úr Havn, tey eiga døturnar Kristinu og Sissal umframt ommu- og abbabørn.

# Óla Jákup Kristoffersen 50 ár

Óla Jákup Kristoffersen verður 50 ár sunnudagin 18. januar 2009.

Óla Jákup er føddur og uppvaksin í Havn. Eftir lokið studentsprógv fór Óla Jákup undir løgfrøðislesnað við Københavns Universitet, haðani hann tók prógv í 1985. Hann fór sama ár í starv á Advokatskrivstovuni, har hann hevur starvast síðani.

Óla Jákup er elstur av trimum børnum hjá Kristoffur og Agnas. Hann hevur tvær systrar, Anna og Bjørg.

Tá Óla Jákup ikki er til arbeiðis, er hann virkin innløgumaður, bæði á sjógvi og landi.

Óla Jákup er giftur Marnu. Tey búgva í Hoyvík og eiga børnini Beintu (21 ár), Kristoffur (17 ár) og Herborg (13 ár).



## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **John Egholm**, Vestmanna, fer av Landssjúkrahúsinum fríggjadagin klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju leygardagin klokkan 13.

**Olivar Reinert** úr Syðradali fer til gravar úr Kalbaks kirkju leygardagin klokkan 12. Tey, ið vilja minnast Olivar kunnu lata Hjartafelagnum eina peningagávu. Konto í peningastovnunum.

## Dagurin

**16. januar. Marcellus**, deyður ár 309. Varð kosin til páva í árinum 307.

**17. januar. Antionius**, róptur hin Mikli. Føddur í Herakles í Egyptalandi umleið ár 250. Býtti allar ognir sínar út millum tey fátæku og livdi síðan sum einbúgvi í oyðimørkini, men stóð í brævaskifti við mætar kirkjumenn og gjørdi eisini vart við seg í stríðinum um ta kristnu kirkjulæruna, sum Arius íbirti. Antonius doyði í 356. Grikska navnið merkir *hin blómandi.*

**18. januar. Prisca**. Ung genta, sum einaferð í 3. øld verður hálshøgd fyri trúar sakir. Gomlu jól enda, tá ið jóladagur er 6. januar eftir julianska kalendaranum.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu,
tá kæri maður mín, pápi, verfaðir, abbi
og langabbi okkara

**John Joensen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk tit tykkum øll, sum hjálptu okkum í sambandi
við jarðarferðina.
Tøkk til øll, ið fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað.
Stóra tøkk fyri gávur til Akurin.

*Fyri tey avvarðandi*
**Daisy**
**Joan, Viggo og May við familjum**


altíð við tí nýggjasta!



**Tekna teg sum haldara nú fyri einans**

**495,- um ársfjórðingin**

**Sparið 560,-** í mun til leysasølu!

Í dag er neyðugt hjá øllum at fylgja væl við í fjølmiðlunum, har vinnulív, politikkur, mentan, handil o.a. verður dagliga viðgjørt.

**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Verður sent ópostað. Sosialurin rindar postgjaldið

64

Navn:

Bústaður:

Bygd / býur:

Telefon:

Undirskrift:

Send lepan til: Sosialurin, boks 76, FO-110 Tórshavn